vit best

Jógvan Heinesen, Egga, har hann trívist best. Í køkinum á Hotel Norð uppi yvir grýtunum og við konu sínari, Miriam, undir liðini

hús, viðlíkahald av hotellinum ella hvat tað nú skal vera. Til dømis hevur hann sjálvur gjørt eitt rulluportur uttan fyri hotellið, tí hann vildi ikki hava seyð gangandi uttanfyri.

– At sita í frið, dugir Egga ikki. Hann hevur altíð okkurt at takast við, sigur Miriam. Egga leggur afturat, at tað er deiligt at kunna gera okkurt annað til tíðir, tí so gerst ein ikki so skjótt troyttur av sínum arbeiði.

Egga greiðir frá, at hann júst hevur keypt partin hjá mammuni í hotellinum, so í dag eiga hann og Miriam tað einsamøll. Tað dámar honum væl.

Ymisk tiltøk

Hotellið á Viðareiði er sum sagt bert opið frá mai til september. Men tað er ikki nóg mikið til raksturin av hotellinum, so Egga plagar at skipa fyri tiltøkum av ymiskum sløgum. Seinastu tríggjar vikurnar hevur hann skipað fyri tveimum jólaborðhaldum, og í kvøld verður so tað seinasta av sínum slagi.

Har borðreiðir hann við buffét við 35 ymiskum rættum. Undirhald er undir borðhaldinum og dansur aftaná. Hesi jólaborðhaldini eru rættiliga vælumtókt, og fleiri fyritøkur nýta høvi til at halda teirra jólaborðhald á hotellinum.

– Hetta er triðja árið vit skipa fyri jólaborðhaldunum, og tað vindur meira og meira upp á seg, greiðir Egga frá.

Fyrsta árið var bert tað eina borðhaldið, í fjør vóru tvey og í ár mátti hann so hava trý, tí undirtøkan var so stór. Tá borðhaldið í kvøld er av, hava yvir 700 fólk tilsamans verið til tey trý borðhaldini.

– Hotellið skal bera seg, og til tess mugu tiltøk, har er onki við at gera, sigur hann og viðgongur samstundis, at tað er nógv stríð at skipa fyri slíkum stórum borðhaldum við so mongum ymiskum rættum.

Seinasta leygarkvøld var tó onki jólaborðhald á hotellinum, tí tá var tað útleigað til brúdleyp. Egga sigur, at tað var ein lætti at sleppa at gera mat til 180 fólk. Tríggjar rættir og onki meira roks.

Av øðrum tiltøkum, sum eru á hotellinum kunnu nevnast haruball, sum varð hildið fyri fyrstu ferð í januar í ár. Tað verður aftur komandi ár. So eru bindiklubbaveitsla, ræstkjøtaveitsla og sum áður nevnt verður hotellið mangan nýtt til skeiðsvirksemi.

Hetta umframt at hotellið ofta verður leigað út til brúdleyp og aðrar veitslur, ger, at tað sjáldan kemur fyri longur, at Egga hevur ein heilan mánað frí út í eitt, men tað ger honum ikki mun.

Alt er til sølu

Nú eru tað seks ár síðani, at Egga sum einans 21 ára gamal keypti sín part í hotellinum. Hann viðgongur, at hann helst hevði hugsað seg betur um, um hann fekk hetta tilboðið í dag. Men samstundis leggur hann dent á, at honum dámar væl tað, sum hann ger.

– Eg dugi ikki at siga, um eg framvegis eigi hotellið, tá eg verði 40 ár. Alt er jú til sølu, men eg trívist í hesum sum nú er, staðfestir Egga, og Miriam leggur afturat, at tað gera tey bæði.

Nógv er eisini, sum bendir á, at tey verða verandi á Viðareiði, tí í januar byrjar útgrevsturin fyri teirra nýggju húsum. Tað gleða hjúnini seg avbera nógv til, tí tað er við at vera nakað trongligt í húsunum, sum tey keypti frá ommu Egga fyri nøkrum árum síðani.

Virksemið á Hotel Norð hevur yvir tey seinastu árini blómað, og árið í ár hevur ikki royndst verri enn í fjør, men jólini hava sambært Egga verið serliga góð í ár.

– Hotellið hevur ligið í einari fastari legu seinastu trý árini, og tað kennist trygt, sigur Jógvan Heinesen.

Egga var einans 21 ára gamal, tá hann í 1998 keypti sín part í Hotel Norð